Ónøgdir vágamenn

Vágamenn eru alt annað enn fegnir um, at Darius Magdisauskas nú skal fara til B36. Teir finnast at framferðarháttinum hjá høvuðsstaðarfelagnum, sum hinvegin sigur seg hava handlað í tráð við galdandi lógir



Vágamaður ella havnarmaður. Hetta tykist vera spurningurin viðvíkjandi Darius Magdisauskar

Í Vágum er tað ikki farið óátalað fram við borðinum, at B36 hevur gjørt avtalu við verjuálitið, Darius Magdisauskas, um at hann skal spæla við teimum eftir summarsteðgin.

Uttanum

Páll Olsen sigur vegna FS Vágar, at orsøkin til ónøgdina er, at teir vistu av ongum, fyrr enn Darius boðaði frá, at B36 hevði sett seg í samband við seg.

Vágamenn hildu lítið um hetta, og ynsktu ístaðin, at B36 tosaði við teir. Hetta hava teir eisini gjørt - eina ferð - og síðani vistu teir av ongum, fyrr enn teir í Sosialinum kundu lesa, at B36 sigst hava ognað sær leikaran.

Umframt ónøgdina um framferðarháttin, so er talan í løtuni eisini um fíggjarligt trætumál millum vága- og havnarmenn. Feløgini eru ikki komin ásamt um, hvussu stóra upphædd vágamenn skulu hava fyri at lata leikaran fara, og í løtuni arbeiðir sakførari við hesum, frættist úr Vágoynni. FSF hevur annars gjørt eina fyribils niðurstøðu í málinum, men hesa eru vágamenn alt annað enn nøgdir við.

Páll vil ikki siga, hvussu stóra upphædd talan er um, men hann leggur tó afturat, at verða allar tær útreiðslur, sum FSV hevur havt í hesum sambandi lagdar saman, er talan um meira enn 100.000 kr.

Púra klárt

Kristian á Neystabø, formaður í B36, sigur við Sosialin, at frá teirra síðu er málið klokkuklárt.

-Talan er ikki um, at vit hava verið úti um okkum í hesum føri. Leikarin er sjálvur komin til okkara, og har er okkara fatan, at um ein leikari hevur hug at koma til felagið, og um vit meta okkum kunna gera nýtslu av honum, so skal hann vera vælkomin, sigur Kristian á Neystabø.

Hann hevur annars ongar viðmerkingar til, at FSV ætlar sær víðari við málinum, men leggur bert afturat, at B36 bert hevur fylgt teimum reglum, sum FSF hevur stungið út í kortið.

Skiftistíð

Annars er flytingin hjá Darius ikki einasta broytingin, sum vágamenn eru fyri í summarsteðginum. Eyðfinn Fjalsbak fer eftir summarsteðgin at ganga í skúla í høvuðsstaðnum, og skiftir hann í hesum sambandi til HB.

Páll Joensen leggur tó dent á, at teir í hesum sambandi einki hava at finnast at framferðarháttinum.

Maður kemur í mans stað, og soleiðis tykist eisini vera hesu ferð. Nú Darius er farin úr felagnum, er vorðin rúmd fyri nýggjum útlendskum leikara, og hetta ætla vágamenn sær eisini at gera nýtslu av. Líkt er nevnliga til, at teir eftir summarsteðgin fara at hava enn ein litaviskan leikara á liðnum. Hesu ferð er talan tó um ein miðvallara, og er navnið á honum Igoris Kirilovas.

Melda greitt út

Annars hevur FS Vágar í málinum um Darius sent út tíðindaskriv, og verður hetta prentað í heilum líki niðanfyri:

Tað kom okkum dátt við, tá vit í Sosialinum nú um dagarnar sóu, at ein av okkara leikarum leikar venjingardystir við B36. Ikki minni skakkir blivu vit, tá blaðið enntá ber tey tíðindi, at B36 styrkir sær um liðið við hesum leikara.

Einum nýtist ikki at vera blaðmaður, magistari ella apotekari fyri at finna útav, at ein leikari einans kann leika fyri eitt felag á gangin. Tað skal tí ikki vera nøkur loyna, at tað ørkymlaði okkum ikki sørt, tá vit funnu útav, at umrøddi leikari var byrjaður at venja við B36 í summarsteðginum, eftir at hann ikki møtti til venjing hjá okkum, og annars ikki røkti aðrar skyldur, sum hann hevði átikið sær yvir fyri felag okkara.

Hetta málið má nú roknast at vera farið út um øll mørk, nú vit lesa í blødunum, at B36 byrjar at nýta leikara, hvørs spæliloyvi er í okkara hondum, í venjingardystum, uttan nakra sum helst avtalu ella fráboðan um hetta.

Vit skulu tó loyva okkum at upplýsa, at síðst í juni mánaði boðaði Darius okkum frá, at hann og B36 høvdu avtalað, at hann skuldi leika fyri teir eftir summarsteðgin, og vildu vita, um vit høvdu nakað ímóti at hann fór. Okkara metan var og er, at tað er óheppið at missa leikarar mitt í kappingini, og serliga ein útlending, sum vit hava brúkt pengar og nógva orku upp á at fáa hendan vegin við familju.

Men havandi í huga samsýning og treytir annars, ið B36 bjóðaði honum, var tað okkum beinan vegin greitt, at her hevði eitt lítið felag sum FS Vágar ongar møguleikar at kappast.

Hinvegin gjørdu vit greitt, at tað eftir okkara metan var sera óheppið, at eitt felag ger avtalu við leikara hjá okkum, uttan at boða okkum frá, og at vit ynsktu, at B36 tók samband við okkum beinleiðis.

At grasið er grønari hjá B36 enn hjá FS Vágum er møguliga ein sannroynd, men »at rola innan fyri« er ikki fair-play, og tað skal tí eingin ivi vera um, at vit krevja okkara rætt í samband við eina loysn av hesum málinum.

Hinvegin skal heldur eingin ivi vera um, at FS Vágar í framtíðini kemur at hava bæði tilgongd og frágongd av leikarum. Hetta ynskja vit at gera í góðum ítróttaranda, og vóna vit, at tíðin leikarar stødast hjá okkum verður eitt upplivilsi fyri teir.

Skuldi framtíðin lagað tað soleiðis, at Darius ikki kemur leika fyri okkum framyvir, fara vit hervið at takka honum fyri tíðina, hann var her, eins og vit ynskja honum alt tað besta í framtíðini.

Føroyskir kajakrógvarar royna seg í Grønlandi

Í hesum døgum royna tríggir føroyingar seg í grønlendska meistaraheitinum í kajakrógving

HEINI Í SKORINI

Havnar Kajakfelag luttekur í hesum døgum við trimum luttakarum í Grønlendska meistaraheitinum (GM 2000) í kajakrógving. 136 luttakarar eru tilsamans við í kappingini, bæði børn, kvinnur og menn. Luttakararnir koma úr Grønlandi, Kanada, USA, Onglandi, Noregi, Danmark og Føroyum. Kappast verður í styttri og longri teinum frá 5-40 km.

Føroysku luttakararnir eru Páll Olaf Jacobsen, Tomas Davidsen og Jákup Jacobsen.

24. juli royndu Páll Olaf og Tomas seg á 5 km teini, og teir komu á mál ávikavist á øðrum og áttanda plássið av 28 luttakarum. Hetta var saman við øðrum grønlendskum rógvarum, meðan teir gjørdust nummar eitt og tvey í internationala bólkinum. Sjey menn hvølvdust í sínum kajakkum, av tí at veðrið ikki var til vildar, og teir máttu so siglast inn við báti.

25. juli róði Jákup Jacobsen, og kom hann á mál á triðja plássi av 21 luttakarum.

Til hesar báðar kappingarnar hava tveir stórhvalir og ein grønlandskópur svomið millum rógvararnar, og teir tríggir føroysku kajakrógvararnar siga, at tað var eitt satt upplivilsi, at síggja tveir stórhvalir koma upp at blása bert 5-10 metrar frá kajakkunum

26. juli róðu Páll Olaf Jacobsen og Jákup Jacobsen heilar 20 km í allar fagrasta veðrið, og kappaðust teir móti 68 øðrum rógvarum. Páll Olaf kom á mál á fimta plássi samlað, meðan Jákup gjørdist nummar sjey. Í skrivandi stund er endaliga úrslitið tíverri ikki komið enn. Higartil má sigast, at hetta er eitt sera gott avrik hjá so ungum felagið, sum Havnar Kajakfelag er.

Kappingin endar næsta mánadag, og verður kappast allar komandu dagarnar. Endabresturin í kappingini verður ein 40 km long kapprógving, og um alt gongur sum eftir ætlan, vera føroyingarnir eisini umboðaðir í hesi kapping.

Tað gongst væl hjá føroysku kajakrógvarunum, sum í hesum døgum kappast í Grønlandi

Lýsingartorgið

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
- ✓ privatar lýsingar
- ✓ í mesta lagi 40 orð
- ✓ bert ein lutur í hvørjari lýsing
- ✓ hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
- ✓ frá fyritøkum og virkjum
- ✓ fleiri enn 40 orð
- ✓ søluvirði oman fyri 20.000 kr.

tó minst 50,- kr. + MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
50,- kr. + MVG hvørja ferð:
- ✓ lýsingar undir teigunum: »Dansur«, »Fundir« og »Matur«
- ✓ Bill. merktar

Akfør

DAIHATSU CHARADE G100
árg. 87, til sølu fyri 2.000 kr. Hevur plátur. Stendur á Tvøroyri.
Tlf. 210608

EYKALUTIR
til Toyota Carina ST 171, árg. 88-91: Hurðar, bakrútur, síðurútar, startari, elrútavindari, drívaksil, tendring og spegl-h.
Tlf. 455843

FORD SIERRA
árg. 84, til sølu fyri 7.000 kr. Sýnaður í nov. 99.
Tlf. 310960

GEARKASSI YNSKIST
Um tú hevur ein gearkassa til Nissan Bluebird U11 1,8, motor typa ca., so vinarliga ring
Tlf. 361092

TIL SØLU
Opel Rekord 2.0 GL stationcar, ongar plátur, kann koyra, gongur næstan gjøgnum sýn. Prísuppskot 2.000 kr.
Tlf. 210800

KAMPINGVOGNUR
Sprite Alpine til sølu, køliskáp og gasskomfýrur er í honum.
Tlf. 312604 ella 212504

KØLARI
til Mazda 626, árg. 87, til sølu fyri 400 kr.
Tlf. 331647

MICHELIN SUMMARDEKK
14"-165-70, einans koyrt 1.000 km, bíliga til sølu.
Tlf. 220970 - 443176

MOTORUR
og gearkassi til Mazda 626 2.0, árg. 86, til sølu sum eykalutir. Prísuppskot 1.000 kr.
Tlf. 321647

OPEL ASCONA 2,0i
árg. 88, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 281895

PEUGEOT 106 DIESEL
til sølu. 2 ára gamal og sera økonomiskur.
Tlf. 313444 - 311612

TIL SØLU
Toyota Carina 1.6 XL, árg. 5/89, koyrt 153.000 km.
Tlf. 374514

Lýsingartekstur

_____

_____

_____

_____

_____

_____

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir *(set X)*
undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Brævaskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út- & sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ ……

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12.00. T.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi

Sent hevur:

Navn: ……

Bústaður: ……

Bygd/býur: ……

Tlf.: ……

»Lýsingartorgið«
Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76,
110 Tórshavn

Til frímerki

TIL SØLU
Honda Accord 2000 EX til sølu um hóskandi boð fæst. Í sera góðum standi, sýnaður í mai 2000 og góðkendur. Hevur nýggjar sportsfelgur, 16"205/55.
Tlf. 210814

TIL SØLU
Citroen AX GT, árg. 88 bíliga til sølu.
Tlf. 313596 ella 221626

TIL SØLU
Ein Hyundai Sonata 2L 16V 130H, árg. 99, við elrútum, sentrallási og 15" sportsfelgum og einum nýggjum Kenwood anleggi.
Tlf. 220464 - 443054

TIL SØLU
Diesel motorur Toyota 1C, krevur ábøtur. Prísuppskot 1.500 kr.
Tlf. 321647

TIL SØLU
Tvey dekk, 175x14, á felgum, til Mazda 626 2,0, árg. 87, sum nýggj.
Tlf. 321647

TIL SØLU
Nissan Sunny 14LX, árg. 89, sær gott út, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 444378, e. kl. 18

TIL SØLU
Citroën AX 11 TRE, árg. 89, til sølu. Hevur motorskaða.
Tlf. 455895
Fax 457295

TIL SØLU
Ein Toyota Carina II 18 GLI, árg. 88, powerstýring, nýsýnaður. Prísuppskot 20.000 kr.
Tlf. 321647

TIL SØLU
Goodyear Eagle F1 dekk til sølu. Stødd 205/55-15, einans koyrt 8000 km. Prísur fyri 4 stk kr. 2.600. Ring 215686 ella skriva til hans@post.olivant.fo

TIL SØLU
Citroën 11ax, árg. '89, til sølu fyri kr. 10.000. Smærri umvælingar skulu gerast. Koyrt 96.500 km.
Tlf. 315265 (heima)
316277 lok. 42 (arbeiði)

TOYOTA CARINA EXL 2,0
Turbo diesel, 06/97, 83.500 km, Sony stereoanlegg til 10 fløgur. Bilurin er gráur og í sera góðum standi. Prísuppskot 135.000 kr.
Tlf. 222081 ella 444237

TOYOTA COROLLA 1.6
í sera góðum standi, sýnaður í okt. 99, lakeraður í aug. 99, árg. 88, 122.000 km, til sølu fyri 30.000 kr.
Tlf. 327019,
e. kl. 18

TOYOTA COROLLA XL
til sølu um hóskandi boð fæst. Árg. 89, brúkar bensin, seinast sýnaður í mai 2000 (ongan kross), hevur koyrt uml. 100.000 km.
Tlf. 373869,
e. kl. 17

VW GOLF 1,9 TDI
Vælhildin, myrkabláur, árg. april/1998, til sølu fyri 159.000 kr.
Tlf. 321213

VW GOLF GL 1,9 TD
5 hurðar, árg. 92, blámetal, servo, sentrallás og elspegl v.m. Bilurin er í sera góðum standi. Til sølu fyri 78.000 kr.
Tlf. 217566 & 217567

VW PASSAT 1,9 TD
st. car, árg. 94, hvítur, abs, 2Xairbag, servo, sentrallás, el-sóltak og takskinnarar v.m. Bilurin er í sera góðum standi. Til sølu fyri 114.800 kr.
Tlf. 217566 - 217567

Amboð

BLANDIMASKINA
ynskist til keyps.
Tlf. 217948

TIL SØLU
Brúktar Bob Cac gravmaskinur á goymslu, 2500 og 3500 kg. Maskinurnar eru í góðum standi. Verða seldar fyri sera rímiligan prís. Keyp góðsku, motorkraft, maskinurnar til føroysk viðurskifti.
Kaj Andreasen & Co
Tlf. 315600

VARIANT VIÐFESTISVOGNAR!
Í tíðarskeiðnum 20. juli til 1. aug. geva vit serlig tilboð uppá vognar, sum eru á goymslu!
Kaj Andrasen & Co
Tlf. 315600

Arbeiði

ALLUR GREVSTUR
verður gjørdur við mini gravmaskinu, t.d. tún, havar og mangt annað.
Tlf. 421643, 211643 ella 282643

ARBEIÐI SØKIST
Vit eru tveir 14 ára gamlir dreingir, ið søkja arbeiði. Alt hevur áhuga. Ring
Tlf. 314322, Jonfinn
Tlf. 321456, John

YNSKJA TYGUM
túnið asfalterað skjótt, bíliga og væl, so er bert at ringja til K.Z.R. asfalt og fáa eitt tilboð.
Tlf. 222546

Barnaútgerð

BARNAVOGNUR/ BILBARNASTÓLUR
Ein bláur, leðurlokk, væl viðfarin Brio barnavognur og ein Britax bilbarnastólur, 9 til 18 kg, til sølu.
Tlf. 373879

MADRASSA
115x55x9 cm, næstan óbrúkt, til sølu fyri 400 kr. Nýprísur 598 kr.
Tlf. 316184

RIMASONG
v/ madrassu bíliga til sølu.
Tlf. 310767

TIL SØLU
Hálvhøg barnasong v/ forhangi til sølu fyri 1.200 kr. Sum nýggj.
Tlf. 310068

TIL SØLU
Bilbarnastólur, 0-4 mðr., til sølu fyri 500 kr. Lítið og onki brúktur.
Tlf. 310068

TIL SØLU
Brio blåblomst barnavognur við lift, regnslagi og ein E4 góðkendur bilstólur til sølu fyri 3.000 kr. Brúkt til 1 barn.
Tlf. 283738

TIL SØLU
1 ára gamal, myrkabláur barnavognur v/ lift, regnslagi, kodda, dýnu og tasku til sølu fyri 1.400 kr.
Tlf. 441280

Barnaansing

AU-PAIR
Pige søges til at passe Jeppe på 3 år (er i halvdags børnehave), og Aksel på 8 mdr. Start snarest. Nærmere oplysninger fås på tlf: 86888630

DAGRØKTARMAMMA
ella barnagenta søkist at ansa eftir 14 mðr. gomlu Turið gerandisdagar frá 1. aug. Arbeiðstíðirnar skifta millum 7.30-16.00 og 13.30-17.30, tó mest 13.30-17.30.
Tlf. 314448

DAGRØKTARMAMMA/ HEIMAGANGANDI
við børnum søkist at ansa eftir 3 ára gamlari gentu uml. 10 dagar um mánaðin.
Tlf. 322824

KONA/GENTA SØKIST
at ansa eftir 1 ára gamlari gentu frá 14. aug. kl. 7.45–16.00
mánadag-fríggjadag.
Tlf. 311012 - 212822

SØKT VERÐUR EFTIR
konu/gentu at ansa eftir 16 mðr. gomlu dóttur okkara frá hálvum august.
Tlf. 318386 ella 328021, Jórun

SØKT VERÐUR EFTIR
at ansa eftir hálvt ára gomlu dóttur okkara skjótast gjørligt.
Tlf. 444699

Bátaútgerð

BÁTUR YNSKIST
Fittligur bátur, helst glastrevjað, uml. 6-mannafar í støddd, ynskist til keyps fyri sámuligan prís.
Tlf. 217948

GLASFIPURBÁTUR
við A-fiskiloyvi til sølu um hóskandi boð fæst. Báturin er í sera góðum standi.
Tlf. 424790/218790,
best eftir kl. 18.30

HUMMARALOYVI TIL SØLU
Eitt hummaraloyvi við 250 rúsum á Skálafirði, Tangafirði og inn móti havnamerkinum í Kollafirði til sølu.
Tlf. 447071 ella 213376

STARLETT 29
til sølu um hóskandi boð fæst. Er hampuliga væl útgjørdur.
Tlf. 221870

TIL SØLU
Eitt frambygt 8-mannafar við motori til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 373202

YNSKIST
Umstýring til 30 HK Sabb diesel ynskist til keyps.
Tlf. 222039 / 443379

Bingo

KIWANISKLUBBURIN RÓSAN
hevur bingo í Pálsstovu sunnudagin 30. juli kl. 16. At vinna: 1 rekkja 75 kr., 2 rekkjur 150 kr. Full plátu 500 kr. + síðuvinningar. Á lutaseðlinum eru 14 x 100 kr. og ein vikuskiftisflogferð. Drigið verður millum spelini. 15 plátur fyri 100 kr. Eisini verður eykaspæl. Kiwanisklubburin Rósan

Burturm. /funnið

ERICSSON T18S
burturmist í Fuglafirði ella í Vestmanna á vestanstevnu. Er blá við klárari antennu.
Tlf. 444365

FUNNIÐ
Troyggja funnin við gøtuna ímillum Eystara Ringveg og Hoydalsá.
Tlf. 311726

TIL SØLU
Svort Ericsson GSM telefon burturmist í Havn. Møguligur finnari biðist ringja
Tlf. 456964 ella 221116

Býli

BYGDARSTOVAN Í HESTI
verður leigað út.
Tlf. 328023

ELDRI HÚS
í Kvívík til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 316918 - 310449

FRÍTÍÐ Í MIKLADALI
Njótið friðaligt umhvørvi í Mikladali í frítíðarhúsum við øllum hentleikum.
Tlf. 455267 ella 456939

GJÓGV - VIKUSKIFTI/ FERIU
Hevur tú hug at uppliva ta vøkru náttúruna við Gjógv? Vit leiga út eitt sera hugnaligt frítíðarhús við vanligum hentleikum.
Tlf. 423138, 313423, 316505, 284705

HÚS Í HALDARSVÍK
Vælhildin og sera hugnalig hús til sølu í Haldarsvík. Húsini eru í trimum hædum á 40 fermetrar. Eisini er úthús og havi rundanum. Prísuppskot 375.000 kr.
Tlf. 423266 - 220514 - 332125

HÚS Í VÁGI
til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 373278

HÚS TIL LEIGU/UMBÝTAN
Í friðarligum umhvørvi, væl fyri í Árhus, eiga vit randarhús, 92 fermetrar, sum vit vilja leiga út, um vit ístaðin kunnu leiga tygara hús/íbúð í Tórshavn eitt tíðarskeið.
Tlf. 004586212630 ella 311603